ítróttur

Nr. 165 • mikudagur • 1. septemer 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Ove sinnaður at halda fram

Fyri tveimum mánaðum síðani sigur KÍ venjarin seg hava boðað leiðsluni í felagnum frá, at hann er sinnaður at halda fram í Klaksvík undir somu fíggjarligu treytum sum higartil, men hann sigur seg hava sett ynski fram á øðrum økjum, sum hann vil hava felagið at viðgera

– Okkum dámar væl í Klaksvík, og eg kenni tað vera meining í arbeiðnum, sum vit gera, sigur Ove Flindt Bjerg, sum fegin heldur fram í venjarastarvinum í Klaksvík

KÍ VENJARIN
Jóannes Hansen

Tað tykist vera eitt sindur óvist, hvussu tað fer at vera við venjarum næsta ár. Í vikuskiftinum boðaði HB frá, at teir hava gjørt avtalu við Heine Fernandez um, at hann eisini næsta ár skal venja meistaraliðið. Higartil hevur einki verið at frætt um, hvussu tað verður í hinum feløgunum. Men tað skilst, at tað verður arbeitt av lívsins kreftum fyri at fáa viðurskiftini upp á pláss fyri komandi kappingarár. Eitt nú sigt GÍ venjarin, Krzystof Popczynski at hava verið í sambandi við í minsta lagi trý feløg. GÍ er eitt av hesum feløgunum.

Ove Flindt Bjerg hevur einki ímóti at halda fram sum venjari í Klaksvík. Tað hevur hann boðað KÍ leiðsluni frá í juni mánað. Og danski klaksvíkingurin ætlar sær ikki at fáa meiri í lønarposan næsta ár, enn hann fær í hesum árinum.

– Okkum dámar væl í Klaksvík, og eg kenni tað vera meining í arbeiðnum, sum vit gera. Mær dámar væl felagið, og eg haldi, at tað í KÍ verður gjørt eitt gott arbeiði. Tá ið vit komu til Klaksvíkar, segði eg, at tað vóru ikki pengarnir, sum drógu meg henda vegin, og eg ætli mær framvegis ikki at verða ríkur av at vera venjari í Klaksvík. Eg vil halda fram undir somu lønartreytum, sum eg havi havt í ár, sigur Ove Flindt Bjerg.

Vil tað so siga, at tú eisini næsta ár verður KÍ venjari?

– Tað er ikki avgreitt enn. Undan summarsteðginum spældi eg út yvirfyri leiðsluni, hvat eg kundi ímynda mær fyri komandi kappingarár. Enn eru vit ikki lidnir at tosa um hetta, so nú fáa vit at síggja.

Hvat er tað, sum tú hugsar um?

– Tað hevur eitt nú við spælararnar at gera. Vit hava nóg nógvar kvalifiseraðar spælarar, tá ið eingin er burturfrá, men vit mugu eisini ásanna, at tað hevur ikki verið nóg dygg kapping um plássini í ár. Fyri komandi ár er tað fyrst og fremst týdningarmikið, at vit varðveita fólkið, sum vit hava havt at arbeiða við. Vit hava einar sjey ungar spælarar, sum tey næstu árini kunnu gerast 1. liðsspælarar, um tað verður borið rætt at, men tað sigur seg sjálvt, at teir gerast ikki stuðulsspælarar her og nú. Tí hevði tað verið gott at fingið onkran stuðulsspælara afturat.

Onkrar ábendingar hava verið um, at tað ikki hevur verið so heppið við kapping um plássini á KÍ liðnum?

– Samstundis, sum vit arbeiða við at gera fótbóltsliga partin betri, og tað haldi eg avgjørt, at hann er vorðin, so er tað týdningarmikið, at tað í einum felag sum KÍ er fatan millum fólkið fyri, at tað kann koma seg soleiðis, at onkur, sum hevur verið fastur á liðnum, eitt skifti verður eykaspælari, uttan at tað skal hava so ógvusligar avleiðingar, at spælarar tosa um at skifta felag. Tað ber ikki til.

Hevur tú kent stórt trýst á tær, nú tað leingi ikki gekk serliga væl?

– Sum ítróttarmaður havi eg so nógvar og drúgvar royndir, at tað hevur ikki bilað. Tú skalt minnast til, at eg havi spælt í týsku bundesliguni, har trýstið var støðugt og stórt á okkum. Nú tá ið úrslitini í fleiri umførum ikki vóru so góð, varð nógv tosað í og kring felagið. Eg veit væl, og tað er ein styrki fyri felagið, at áhugin í býnum er rættuliga stórur fyri KÍ, men eg má siga, at eg sum menniskja havi verið skulu vit siga ørkymlaður og ikki sørt vónbrotin av summum av tí, sum hevur verið tosað. KÍ viðhaldsfólkini mugu ikki gloyma, at tað serliga í torførum tíðum er týdningarmikið at stuðla og bera.

Um tú verður venjari næsta ár, verður KÍ so við í kappingini um meistaraskapin?

– Nú mugu vit fyrst fáa hetta kappingarárið frá hondini og vóna, at góða gongdin síðstu vikurnar fer at halda fram í fýra teimum síðstu umførunum. So kann tað væl fara at vísa seg, at vit fara at røkka upp um miðjuna í endastøðuni. Sum eg so ofta havi sagt, so er KÍ í góðari menning. Tað sást eisini á úrslitunum í yngru deildunum, sum so at siga allar hava fingið góð úrslit í ár. Tað gongur rætta vegin, og um vit varðveita fólkið, sum vit hava, og møguliga fáa onkran afturat, samstundis sum ungu menninir mennast, so rokni eg við, at KÍ í framtíðini fer at kappast har, sum tað er hugaligt at vera við, sigur Ove Flindt Bjerg.

Sveisiski hópurin

Sveisiski landsliðsvenjarin hevur sjávlandi tikið sær ein hóp út, sum hann fer at seta sítt álit á, nú Sveis enn einaferð skal royna at vinna sæti í einum endaspæli.

19 mans eru úttikinir, og tó at tað ikki eru øll nøvn, sum fáa eina klokku at ringja í fótbóltsminninum hjá vanliga føroyinginum, so eru tó nakrir profilar á liðnum, sum avgjørt hoyra til høgan europeiskan miðalklassa.

Eitt nú kunnu nevnast Liverpool-verjuleikarin, Stephane Henchiz, og PSV-miðvallarin, Johann Vogel, sum í drúgt áramál hava prógvað, at teir avgjørt megna at standa seg á allar hægsta stigið, og eisini Hakan Yakin í VfB Stuttgart hevur til tíðir sýnt sínar avgjørdu dygdir. Og tað sigur nokk heldur ikk so lítið um styrkina hjá hesum leikarum, at bæði Stuttgart og PSV gjørdust meistarar í vár, og saman við Liverpool skulu hesi feløgini so leika í europeisku meistarakappingini.

Í Sveis hava tey helst vónir um eina endurtøku av 5-1 sigrinum, sum tey vunnu á Føroyum í 2000

Teir 19, sum eru úttiknir til hópin, eru annars hesir:

Málverjar	
Sébastian Roth	Servett FC
Pascal Zuberbühler	FC Basel
Útileikarar	
Stéphane Grichting	AJ Auxerre
Bernt Haas	West Bromwich Albion
Stéphane Henchoz	Liverpool
Magnin Ludovic	SV Werder Bremen
Patrick Müller	RCD Mallorca
Cristoph Spycher	Grasshopper-Club
Murat Yakin	FC Basel
Tranquillo Barnetta	Hannover 96
Ricardo Cabanas	Grasshopper Club
Daniel Cygax	FC Zürich
Benjamin Huggel	FC Basel
Johann Lonfat	FC Souchaux Montbéliard
Alexandre Rey	Neuchatel Xamax FC
Johann Vogel	PSV Eindhoven
Johan Vonlanthen	PSV Eindhoven
Raphaël Wicky	Hamburger SV
Hakan Yakin	VfB Stuttgart

Hondbremsurnar eru uppi

Í trimum dystum í triði síðsta umfarinum varð bara eitt mál skorað, og hetta eina málið var orsøk til, at føroyskir útisetar eru verri fyri, sjálvt um teir ikki vóru í eldinum fyrrenn í gjárkvøldið

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Teir eru av álvara farnir undir sluttspurtin í bestu íslendsku fótbóltsdeildini, sum eitur Landsbankadeildin. Triði síðsta umfarið er á skránni í hesi vikuni. Ein dystur varð spældur sunnudagin, tríggir vóru á skránni í fyrrakvøldið, og í gjárkvøldið - eftir at blaðið var farið til prentingar - varð síðsti dysturin spældur. Hann var millum Fram, sum er felagið hjá Hans Fróða Hansen og Fróða Benjaminsen, og meistararnar tvey tey seinastu árini, KR.

Úrslitini mánakvøldið bóru við sær, at tað var uppaftur meiri týdningarmikið hjá Fram at vinna í gjárkvøldið, enn tað frammanundan hevði verið, og tað sigur ikki so lítið!

Undan dystinum í gjárkvøldið var Fram dottið niður á tíggjunda og aftasta plássið. Fram ímóti kappingarenda plagar tað so mangastaðni at vera soleiðis, at tey liðini, sum eru mest sperd, gera ein vørr. Soleiðis tykist tað eisini at vera í Íslandi nú uppundir kappingarenda.

Mánakvøldið var KA av Akureyri, sum undan sekstanda umfarinum var á aftasta plássinum, í Reykjavík og spældi ímóti Fylkir, sum alt kappingarárið hevur verið við í kappingini um meistaraskapin. KA fór norður aftur til Akureyrar við øllum stigunum. Teir vunnu 1-0. Málið fingu teir stutt undan steðginum. Heimaliðið fekk eftir steðgin gyltan møguleika at javna, men teir misnýttu brotsspark.

Úrslitið hevði við sær, at Fylkir er nógv verri fyri í kappingini um meistaraskapin, enn teir vóru undan sekstanda umfarinum. Úrslitið hevur eisini við sær, at vánirnar hjá KA at varðveita plássið í bestu deildini, er betri nú, enn tær vóru undan vikuskiftinum. Men teir á Akureyuri eru framvegis í vanda fyri at flyta niður. Teir eru næstaftastir. Á niðasta plássinum var undan dystinum í gjárkvøldið Fram.

Alt bendir á, at tað verður millum hesi trý feløgini, at slagið skal standa um, hvørji tvey skulu flyta niður í næstbestu deildina.

Tað er synd at siga, at talan á nakran hátt var um málrok í Íslandi mánakvøldið. Í trimum uppgerðum var tað bara KA, sum megnaði at gera mál, og teir fingu bara eitt mál. Tað tykist sum um, at tað nú verður lagdur uppaftur størri dentur á ikki at tapa, heldur enn at royna eftir sigrinum, enn tað plagar at verða gjørt í Íslandi.

Julian Johnsson og liðfelagarnir hjá honum í ÍA mistu mánakvøldið síðsta møguleikan at vinna meistaraskapin. Enn eina ferð var tað á heimavølli, at teir fingu ov lítið burturúr, og enn eina ferð var úrslitið málleysur javnleikur.

FH, sum seinasta partin av kappingarárinum hevur verið oddalið, vitjaði mánakvøldið í Grindavík. Har eydnaðist Alberti Sævarssyni at halda mótstøðumonnunum burtur frá at gera mál. Úrslitið var 0-0. Harvið legði FH seg framum aftur ÍBV. Men nú er munurin minni, enn hann var undan sekstanda umfarinum. Tá var hann trý stig. Nú er hann eitt stig.

Annan sunnudag verður næstsíðsta umfarið. Tá verður spælt soleiðis: FH-Fram, ÍBV-Fylkir, Keflavík-Grindavík, KR-KA og Víkingur-ÍA. Síðsta umfarið verður leygardagin 18. september. Tá sær skráin soleiðis út: Fram-Keflavík, Fylkir-KR, Grindavík-Víkingur, KA-FH og ÍA-ÍBV.

Leygardagin fer Ísland at spæla fyrsta dystin í nýggju HM undankappingini. Hann verður á Laugardalsvøllinum ímóti Bulgaria. Íslendingar hava gott mót um sítt lið í nýggju undankappingini. Ikki minst eftir at tað á Laugardalsvøllinum mikukvøldið í síðstu viku eydnaðist at vinna vinardyst ímóti Italia 2-0, er áhugin fyri íslendska fótbóltslandsliðnum rættuliga stórur. Umfram Ísland og Bulgaria eru í bólkinum Svoríki, Kroatia, Ungarn og Malta.

Fíggjarliga kundi bólkurin verið meiri spennandi hjá Íslandi, men ítróttarliga halda íslendingar, at teir eiga at hava ein møguleika, hóast Svoríki og Kroatia mugu roknast at vera favorittar at enda á tveimum teimum ovastu plássunum.

Frakland selir væl

Áhugin fyri landsdystinum millum Føroyar og Frakland á Tórsvølli er sera stórur. Fleiri enn 5000 atgongumerki eru seld í forsølu, og nú eru bert 800 atgongumerki eftir

FÓTBÓLTUR
Eydun Klakstein

Tað er rættiliga sannlíkt, at Tórsvøllur verður á tremur við fólki, tá ið fronsku heimsstjørurnar koma á vitjan um eina viku.

HM-undandysturin millum Føroyar og Frakland verður næsta mikudag, og forsølan av atgongumerkjum hevur gingið sera væl. Eini 5000 atgongumerki eru farin, og nú eru bert 800 eftir at selja.

Tey verða seld í forhøllini í FSF-húsinum í Gundadali mánadagin frá klokkan 3 til klokkan 7.

Fótbóltssambandið roknar við, at útselt verður til stórdystin ímóti Fraklandi, sum verður mikudagin 8. september kl. 17.00.

-ek

Ferdinand aftur á landsliðið

Tá ið leikbannið hjá verjuspælaranum Rio Ferdinand er úti í næsta mánaði, verður hann aftur tikin út til enska landsliðið. Tað sigur enski landsliðsvenjarin Sven Gøran Eriksson.

– Ferdinand er millum teir bestu spælararnar í heiminum, og um hann spælir væl eftir leikbannið er einki at ivast í, at hann skal spæla á enska landsliðnum eisini, sigur svenski landsliðsvenjarin hjá Onglandi.

Manchester United spælarin fekk langt leikbann, tí hann ikki møtti til eina dopingroynd.

-ek

Jørgensen skiftir felag

Danski landsliðsspælarin Martin Jørgensen hevur skift felag. Hann hevur seinastu sjey árini spælt fyri italska felagið Udinese, men nú skal hann royna seg í einum øðrum italskum felag – Fiorentina.

– Eg havi altíð havt tað gott í Udine, men eg eri komin har til, at eg havi brúk fyri einari nýggjari avbjóðing, sigur 28 ára gamli Martin Jørgensen.

-ek

Europeisk ítróttarfólk skulu bera ES-flaggið

Formaðurin fyri ES-kommisiónina, Romano Prodi, vónar, at europeisk ítróttarfólk fara at bera ES-flaggið á næstu olympisku leikunum.

– Í Bejing í 2008 vóni eg, at europeisku londini fara at bera ES-flaggið afturat teirra egna flaggi fyri at vísa okkara samleika, segði Romano Prodi gjár.

Hann vísti eisini á, at europeisk ítróttarfólk samanlagt vunnu flest heiðursmerki – eisini meira enn USA og Kina.

-ek

Claus er í hópinum

Nú er tað staðfest, at tað verður 28 ára gamli Claus Bech Jørgensen, sum skal loysa skadda Toda Jónsson av í føroyska landsliðshópinum.

Sum vit skrivaðu í leygardagsblaðnum, so var hetta tað, sum landsliðsvenjararnir arbeiddu við, og nú staðfestir FSF, at tað ikki vóru nakrir trupulleikar við at fáa altjóða spæliloyvið til hálva føroyingin. Tað roknaðu landsliðsvenjararnir heldur ikki við, men tað var so ikki fyrr enn mánadagin, at úttøkan endaliga kundi staðfestast.

-jm